


www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 05 - 2012

# Føroyar útgerðarstøð fyri seismiska verkætlan við Jan Mayen

Vaksandi oljuvirksemið í grannalagnum fyri bæði sunnan, norðan og eystan hevur gjørt Føroyar áhugaverdar sum útgerðarstøð fyri eitt nú seismikkskip og útgerðarskip. Fleiri ferðir hava útgerðarskip, sum arbeiða við føroyska markið gjørt av at brúka føroyska havn til at bunkra, skifta manning og kroka í. Nú oljuleitingin tekur dyk á seg longur norðuri eisini, eitt nú við leiðirnar við Jan Mayen, eru Føroyar aftur í fokus. Norska seismikkfelagið PGS, sum hevur fingið eina stóra uppgávu frá norsku stjórnini at gera seismiskar kanningar nær Jan Mayen komandi tríggjar mánaðirnar, hevur gjørt av at brúka Føroyar sum útgerðarstøð. Nordic Explorer, sum skal standa fyri kanningunum, kom á Havnina á middegi fyri at seta hol á komandi verkætlanina, sum eisini tvey føroysk frálandaskip eru partur av. Talan er um hjálparskipið Thor Asister og vaktarskipið Thor Guardian. Hesi skipini koma av leiðunum við Madagaskar og skulu komandi tríggjar mánaðirnar arbeiða fyri PGS á Jan Mayen leiðini. Haraftrat skal Valberg úr Vestmannaoyggjunum eisini veita tænastu sum vaktarskip. At Føroyar gerast útgerðarstøð hjá PGS merkir, at hesi trý skipini fara at bunkra, taka proviant og skifta manningar í Føroyum. Gunnbjørn Joensen, stjóri hjá Thor sigur við oljan.fo, at tað er at fegnast um, at seismikkreiðarí sum PGS umframt at brúka føroysk frálandaskip til sínar uppgávur eisini vilja brúka Føroyar sum útgerðarstað fyri sítt virksemi. Thor í Hósvík er havnaumboð hjá PGS. Myndir - Nordic Explorer á Havnini mikudagin. Thor Guardian á Havnini eftir at hava verið við leiðirnar við Madagaskar í eina tíð. Nú fer vaktarskipið til Jan Mayen. Myndir - oljan.fo/Jan Müller